# Jákup B vann sjómannakappingina





*Tey trý vinnaraliðini í árligu Sjóamannakappingini í fótbóltt vóru: Jákup B, nr.1, Norðborg nr. 2 og Ágot nr. 3*

**Í høðru kappingini millum heili 28 lið gjørdist tað liðið hjá línubátinum Jákup B, sum vann árligu fótbóltskappingina fyri sjómenn, ið varð hildin í KÍ høllini í gjár**

SJÓMANNAKAPPING
*Anna V. Ellingsgaard*
*sosialurin.fo*

Klokkan 11 fyrrapartin byrjaði árliga fótbóltskappingin fyri sjómenn, sum í gjár varð hildin í Klaksvík 6. árið á rað. Eins og undanfarin ár var undirtøkan sera góð, og høvdu 20 skip og bátar mannað ikki færri enn 28 lið – og tá skal havast í huga, at stóru skipini sum Atlantic Navigator, Skálaberg, Sundaberg og Sjúrðaberg øll eru til fiskiskap í løtuni og tí bert fingu mannað okkurt einstakt lið. Flestu bátarnir, sum vóru umboðaðir, eru úr Norðoyggjum, men manningar úr Havnini og Eysturoynni fylla nú eisini heilt væl í Sjómannakappingini.

### Stóru spenningur

Tað var týðiligt, at bæði áskoðarar og sjómenn ganga høgt uppí kappingina. Flestu liðini høvdu skaffað sær serligar liðblusur at spæla í, og onkar av manningunum hava vant heilt nógv til kappingina.

Jørgen Jacobsen, sum spælir við á liðnum hjá Klakki, dylir ikki yvir, at menninir eru sera spentir.

- Vit plaga at leiga KÍ høllina til venjing millum túrarnar fyri at halda okkum í formi og fáa liðið betri samanspælt. Vit hava verið við á hvørjum ári, og gleða okkum líka nógv hvørja ferð. Hetta er stuttligt og sera spennandi, sigur Jørgen.

Hóast tað gekk heilt væl hjá Klakki, hesa løtuna, eydnaðist tað ikki at tryggja sær eitt av vinnaraplássunum í ár. Eitt sindur spell, men liðið hjá Klakki kemur sterkt aftur næsta ár, vissaði Jørgen okkum um.

Hópin av áskoðarum fylgdu við kappingini, og spenningurin í KÍ høllini var í hæddini, tá seinastu umførini vórðu leikt. Tá avtornaði, gjørdist tað liðið hjá línubátinum Jákup B, sum vann kappingina, meðan Norðborg og Ágot endaðu á ávikavist 2. og 3. plássi.

Eftir at vinnandi liðini høvdu fingið handað steyp, vórðu allir teir umleið 120 fótbóltsleikandi sjómenninir bodnir til stórt borðhald í Skálanum.

Sjómannakappingin varð í ár stuðlað av Føroya Bjór, Norðoya Bjargingarfelag og Skipalistanum.



*Spenningurin var í hæddini millum leikarar og áskoðarar, tá seinastu umførini í árligu Sjómannakappingini í fótbólti vórðu leikt í KÍ høllini í gjár*



*- Klakkur verður avgjørt við aftur næsta ár, vissaði Jørgen Jacobsen um, sum her stendur saman við fjepparanum John Villiami Johannesen, sum sjálvandi var í røttum Klakkur fjepparakeppi*



*Fyriskiparin Palli Ziskason og formaðurin í reiðarafelagum, Jákup Sólstein, fylgdu spentir við, hvussu leikur fór úti á vøllinum*

www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum




## Blaðfólk

Á redaktión okkara er spennandi, avbjóðandi og fjølbroytt starv sum blaðfólk leyst.

Starvið fevnir fyrst og fremst um at røkja uppgávur á høvuðsredaktiónini í Vágsbotni. Hartil er ynskiligt, at viðkomandi eisini røkir aðrar uppgávur kring landið. Fyrst og fremst í Norðoyggjum.

Vit hugsa okkum, at tú skalt byrja í starvinum um 15. januar, men er tað ynskiligt, er møguleiki eisini at byrja fyri hetta. Er talan um rætta umsøkjaran, kunnu vit eisini bíða til 1. februar.

Við rokna við, at tú er ein persónur við áræði at fara undir nýggjar uppgávur, har tað ofta ræður um at skjótt at kunna seta seg inn í tey viðurskifti, sum talan er um. At tú ert uppsøkjandi og dugir at arbeiða sjálvstøðugt undir eini ásettari tíðarfreist.

Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving hava fyrimun, men er hetta ikki nøkur treyt fyri starvssetanini.

Lønin er sambært avtalu millum Blaðútgevarafelagið og Blaðmannafelagið.

Er ynskiligt at frætta nærri um starvið, ert tú sjálvandi vælkomin at seta teg í samband við Jan Müller, blaðstjóra, á tlf. 341800. Ella við at senda teldupost á jan@sosialurin.fo

Seainsta freist at søkja starvið er 31. desember 2005, og skulu umsóknir við viðkomandi upplýsingum sendast til:

**Sosialurin**
Jan Müller
Postsmoga 76
110 Tórshavn

*Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blaði. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.*